# Kjak



**Bogi Andreasen**
*varaborgarstjóri, form. í byggi og býarskipanarnevndini*

## Vil Levi Mørk hava hóp av endurgjaldskrøvum upp á nakkan?

Jú, hoyvikingar skulu fáa fótboltsvøll, sjálvandi! Tí taki eg til fulnar undir við. Men tað skal vera við skili og neyðugum umhugsni og atlitum. Og tað skal ikki fremjast við at oyðileggja náttúruvirði og lívið hjá øðrum.

Nógv ár áðrenn bæði Levi Mørk, Jákup Simun Simonsen og eg komu í býráðið, varð gjørd ein yvirskipað ætlan fyri Hoyvikshagan. Stórt sæð alt, sum er bygt har, hevur fylgt hesi ætlan, tað veri seg bústaðarbygging, skúli, Hoyvíkar kirkja, útstykkingin við Myllutjørn og miðstaðargøtan Karlamagnusarbreyt.

Og sum einhvør onnur skilagóð ætlan fyri skipan av býarøkjum, so fevndi hendan ætlan eisini um øki til trivna fyri íbúgvarnar har. Hetta var m.a. við at leggja Dalin Langa út til fríøki, har náttúran verður varðveitt, og at leggja eitt stórt øki uppat nýggja skúlanum til ítrótt.

Hesar staðsetingar og skipan av økinum er tí ikki nakað nýtt. Men tvangstankin, sum Levi og onnur hava fingið í høvdið um, at leggja fótbóltsvøll í fríøkið í Dalin Langa, og harvið at oyðileggja økið sum náturulendi, er tað einasta, sum er nýtt fyri hetta økið.

Tey, sum fyrst og fremst hava krav uppá at verða hoyrd um hesa ætlan hjá Levi og øðrum, eru tey mongu, sum hava keypt sær grundstykki vid Myllutjørn, og ikki FC Hoyvik ella okkurt annað ítróttarfelag, sum Levi heldur. Tí tað verða hesi, sum verða mest ávirkað av hesum ørvitistankanum hjá Levi.

Tey skulu góðtaka at fáa ein fótbóltsvøll kroystan upp í vindeyguni, ístaðin fyri eitt fríøki, sum tey fingu lovað, tá tey keyptu sítt grundstykki. Tað, sum Levi vil, er tískil ein klokkuklár uppskrift uppá at oyðileggja ikki bara fríøkið í Dalinum langa, men er eisini eitt greitt avtalubrot um útstykkingina við Myllutjørn. Og hetta kann útvega kommununi eina rúgvu av endurgjaldskrøvum upp á nakkan. Skattaborgararnir koma tí eisini at gjalda ein høgan prís fyri hesa oyðileggjandi ætlanina hjá Levi.

Eitt er, at Levi vil hoyra FC Hoyvik um staðseting av einum fótbóltsvølli, men tá mann vil fara so langt sum Levi vil, at lata ítróttarfeløg og lokalpolitikarar úr ávísum býarpørtum avgera og broyta býarplanleggingina í høvuðsstaðnum, so hevur mann spælt fallit sum limur í byggi- og býarskipanarnevndini. Og býráðið hevur eisini spælt fallit, um vit lata hetta um okkum ganga.

Um økið við nýggja skúlan er so óegnað sum Levi sigur, so lat okkum kanna, um so er. Og er hetta ein trupulleiki, so lat okkum finna eina aðra staðseting í Hoyvikshaganum, uttan at oyðileggja útstykkingar og fríøki, sum vóru planløgd langt áðrenn Levi Mørk og onnur komu í býráðið.



**Levi Mørk**
*limur í Tórshavnar býráð*

## Eftirmeting av barna og ungdómspolitikki

Hósdagin 5. mai víðkar KLUBB 188 um sítt virksemi við at ung úr 3. til 5. flokk kunna koma í KLUBB 188. Húsið verður opið fyri hesum aldursbólki tvær ferðir fyri summarfrítíðina, og tað verður byrjað hósdagin 5. mai kl. 17.00, og opið verður til 20.00.

Um royndin við at hava opið tvær ferðir fyri summarfrítíðina verður væl móttikin, so verður arbeitt víðari við, at hesin aldursbólkurin skal hava møguleika at koma regluliga í KLUBB 188 eftir summarfrítíðina.

Men hetta er bert ein byrjan, men hon er ikki heilt nøktandi, av tí at tørvurin er størri enn so, og kommunan má finna høli at hýsa børnum úr 3. til 5. flokki í Hoyvík millum kl. 13.30 til kl. 17.00.

Orsøkin til, at vit mugu skipa so fyri, er, at í Hoyvík ganga nógv børn í aldrinum 9 til 12 ár heima einsamøll, uttan at nakar ansar teimum - og tað halda vit ikki vera skilagott.

Summi foreldur hava talað at og sagt fyri mær, at meðan børnini ganga einsamøll heima, verða kókað bæði pastaskrúvur og annað heima eftir skúlatíð.

Eg eri bangin fyri, at ein ólukka kann standast av hesum fyrsta dagin, um ikki kommunan skipar fyri tilboðum til hesi ungu í tímunum frá kl. 13.30 til 17.00.

Vit kenna jú til, at netverkið hjá familjum í Hoyvík ikki er tað sama sum aðrastaðni í Tórshavnar kommunu, tí her eru so nógvir tilflytarar, og her eru ikki so nógvar ommur og abbar, sum kunnu hjálpa foreldrunum at ansa børnunum eftir skúlatíð til kl. 17.00.

Tí meti eg tað vera eina skyldu hjá Tórshavanar kommunu at fara til verka og finna loysnir á hesum øki.

Ein annar trupulleiki er eisini, at børn við serligum tørvi, ikki hava eitt skipað frítíðartilboð eftir skúatíð – og er tað serliga børn við menningartarni, ið hava tørv á, at okkurt verður gjørt á hesum øki.

Hóast Tórshavnar kommuna hevur gjørt serstovu í Frítíðarskúlanum í Hoyvík til børn við autismu, er parturin til børn við menningartarni ikki heilt nøktandi. Tí tað er enn ikki komið hartil, at talan er um eitt skipað tilboð beint eftir skúlatíð.

Eitt annað mál, sum eisini hevur bráðfeingisábøtur fyri neyðini, er at fáa skipað ungdómsvirksemi í Kollafirði. Tórshavnar kommuna hevur sett 1.5 millión av til endamálið við at innrætta loftið í Ítróttarhøllini í Kollafirði, soleiðis at KÍF eisini fær skipað hølisviðurskifti.

Somuleiðis er neyðugt við einum nýggjum ungdómstilboði á Argjum. Her kundi verið møguleiki at funnið eina skilagóða loysn, nú tá ið frítíðarskúlin á Argjum flytur niðan í nýggjan skúlan á Hamarinum. Men tað skal sjálvandi finnast peningur til endamálið fyrst.

Eg ætli mær tí sum býráðslimur at reisa hesi oman fyri nevndu mál í samgonguni, og so vit kunnu finna onkra loysn til komandi fíggjarár. Men tað er sjálvandi ein politisk raðfesting og ein fíggjarligur spurningur. Men eitt er at gleðast um, og tað er , at umsitingin er sinnað at byrja í KLUBB 188 - og leggjast kann afturat, at nú verður arbeitt við, at fáa skipað eina Teldukafé úti á Norðastahorni - og tað er bert eisini at frøast um! Men enn er langur vegur á mál, og møgulig játtan skal eisini finnast til komandi ár.



**Annfinn Brekkstein**
*býráðslimur fyri Sambandsflokkin*

## Býráðslimir - ynskini og tað fíggjarliga mugu passa saman

Samgongulimir hava góð og áhugaverd hugskot um framhaldandi menning av ítróttinum og ítróttaranleggum í Havn. Hvat skal koma fyrst – golfvøllur, fótbóltshøll, svimjuhylur ella nýggjan fótbóltsvøll í Hoyvík. Jú hugskotini eru mong og spennandi, men so sanniliga eisini ein fíggjarliga ein avbjóðing.

Sjálvur haldi eg, at tað eru onnur meira átrokandimál at loysa her og nú. Hvat við Kommunuskúlanum og teimum avbjóðingum sum har eru. Ikki tí, Tórshavnar Kommuna hevur gjørt stórar íløgur í nýggjar skúlar í seinastuni. Ein nýggjur skúli bleiv tikin í nýtslu fyri einum góðum ári síðani í Hoyvík, og ein verður liðugur at taka í nýtslu á Argjum til komandi skúlaár.

Sum sagt, vit hava eina stóra avbjóðing í at loysa málið um kommunuskúlan. Skal hann rívast niður og byggjast ein nýggjur kommunuskúli – ein nýggjan miðbýðarskúla. Eitt skulu vit undir øllum umstøðum ikki gloyma, tað standa næmingar, foreldur og lærararar spent og bíða eftir. Hvat verður næsti leikur frá okkum býráðslimun í hesum álvars máli.

Eg dugu illa at ímynda mær, at eingin skúli verður í miðbýnum í framtíðini. Tað liggur eitt námsfrøðiligt innihald og eitt áralangt innihald í einum og hvørjum skúla, eisini í Kommunuskúlanum, sum vit hava skyldu at loysa á skilabesta hátt.

Ein nýggjur skúli í miðbýnum kann geva fleiri møguleikar til økt mentanarlív og møguleikar til enn fleiri og spennandi tiltøk í miðbýnum.

Men, alt hettar er so sanniliga eisini ein fíggjarlig avbjóðing fyri okkum býráðslimir.

Tað er ikki rætta tíðin fyri øktum skattatrýsti á borgarar. Skattgjaldarin hýkur undir alt og stórum skattum og avgjøldum

Ynskini og tað fíggjarliga mugu passa saman, so vit framhaldandi hava ein fíggjarligan sterkan høvuðstað.